

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 06 - 2012

# Prísgongdin órógvar OPEC

Tað hóvasr ikki londunum í OPEC-felagsskapinum, at oljuprísurin hevur verið fellandi ta seinastu tíðina. Tað ásannaði kuwaitiski oljumálaráðharrin, Hani Hussein, eftir fundin, sum hann og hansara starvsbrøður í OPEC-londunum høvdu í Wien nú um dagarnar. -OPEC londini halda eygað við gongdini, og okkum dámar hetta ikki, segði ráðharrin og vísti á, at oljuprísurin er fallin eini 20 prosent teir báðar seinastu mánaðirnar. Á fundinum, sum var í Wien, komu ráðharrarnir til ta niðurstøðu, at tað eru búskaparkreppan kring heimin, lítil eftirspurningur og ov stórt útboð, sum trýsta oljuprísin niðureftir. Teir siga eisini, at spenningurin millum Iran og Vesturheimin hevur stóra ávirkan á oljumarknaðin. Men sambnært Hani Hussein hevur OPEC ikki tikið nakra avgerð um at skerja framleiðsluna, men hann viðgekk, at tað er ikki óhugsandi. Á tí seinasta OPEC-fundinum, sum var beint fyri ársskiftið, samdust londini um at varðveita framleiðsluna, sum er 30 milliónir tunnur um dagin. Tá bleiv sagt, at Saudiarabia, Irak, Kuwait og Libya framleiddu ov nógv. Teir seinastu dagarnar er oljuprísurin kvinkaður uppeftir, men greinarar halda, at tað er ein avleiðing av, at ES játtaði at bjarga teimum sponsku bankunum. ? ?